NORÐOYA SPARIKASSI

# ÁRSFRÁSØGN 2003



# Ársfrásøgn 2003

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-700 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
www.ns.fo
ns@ns.fo

## Sparikassin

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

## Avlop sparikassans

verður – burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

## Í sparikassanum

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

## Innihaldsyvirlit

Um sparikassan 4
Lykla- og høvuðstøl 9
Til ábyrgdarar og viðskiftafólk 10
Árið ið fór 12
Ársfrágreiðing 26
Átekningar til ársroknskapin 29
Rakstrarroknskapur 30
Fíggjarstøða 31. desember 31
Kapitalflytingar og solvensuppgerð 32
Peningastreymsroknskapur 33
Viðmerkingar 34
Nýttur roknskaparháttur 40

Deildir

Klaksvíksvegur 77

Tel. 475000

Fax 476007

Leirvík

Tel. 475100

Fax 476010

Norðdepil

Tel. 475090

Fax 476008

Viðareiði

Tel. 475091

Fax 476009

Telefon- og faxtænastan

Tel. 319494 · Fax 319454

Kort burturmist eftir avgreiðslutíð

Tel. +45 44898929

Umboðsráð

Klaksvíkar Kommuna

Óli Marnar Christiansen, Klaksvík

Jógvan Clementsen, Klaksvík

Hilmar S. K. Danielsen, Klaksvík

Rúni Heinesen, Klaksvík

Søren Ziska Jacobsen, Klaksvík

Jóhann Joensen, Klaksvík

Finn Kjølbro, Klaksvík

Álvur Klakk, Klaksvík

Tummas J. Lervig, Klaksvík

Jákup Mikkelsen, Klaksvík

Victor Nielsen, Klaksvík

Heini Ósá, Klaksvík

Erling Petersen, Klaksvík

Eli Poulsen, Klaksvík

Jóhan Andrias Reyðberg, Klaksvík

Ólavur Samson, Klaksvík

Finnur Sivertsen, Klaksvík

Olivur Thomsen, Klaksvík

Jóhanna á Tjaldrafløtti, Klaksvík

Kalli Váðklett, Klaksvík

Jógvan Vágsheyg, Klaksvík

Hergerð Ziskason, Klaksvík

Eystan Múlan

Absalon í Buð, Hvannasund

Jógvan E. á Geilini, Svínoy

Hanus Suni Hansen, Hattarvík

Hans J. Kallsberg, Viðareiði

Jákup Petersen, Viðareiði

Tórhallur Staksá, Viðareiði

Kalsoy og Kunoy

Jógvan Heinesen, Kunoy

Jógvan Joensen, Trøllanes

Leirvík og Føroyar annars

Peder T. Haahr, Signabøur

Jóannes Hansen, Toftir

Tórbjørn Jacobsen, Glyvrar

Eyðálvur M. Joensen, Svínáir

Jógvan E. Joensen, Leirvík

Edmunda Langgaard, Leirvík

Kjartan Mørkøre, Tórshavn

Bergur á Reynatrøð, Runavík

Joan Ziskason, Tórshavn

Nevnd

Óli Marnar Christiansen, *formaður,* Klaksvík

Finn Kjølbro, *næstformaður,* Klaksvík

Jógvan Joensen, Trøllanes

Álvur Klakk, Klaksvík

Páll Klettskarð, Haraldssund

Erling Petersen, Klaksvík

Kristian M. Eliasen, Leirvík

*starvsfólkaumboð*

Elmar Poulsen, Klaksvík

*starvsfólkaumboð*

Sigrun Skálagarð, Klaksvík

*vald av Búskaparmálaráðnum*

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg, Klaksvík

Grannskoðan

Martin Gaard,

løggildugur grannskoðari, København

Símun Absalonsen,

skrásettur grannskoðari, Tórshavn

| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Stjórn** | | | |
| Eyðfinn Reyðberg | 475000 | 476000 | eydfinn@ns.fo |
| **Klaksvík** | | | |
| **Avgreiðsludeildin og deildin við Klaksvíksvegin** | | | |
| Jákup Olsen, *leiðari* | 475065 | 476000 | jakup@ns.fo |
| Tummas M. Anthoniussen | 475000 | 476000 | tummas@ns.fo |
| Ruth Baldvinsson | 475000 | 476000 | ruth@ns.fo |
| Marjun Hansen | 475013 | 476000 | marjunh@ns.fo |
| Sigrun Heimistovu | 475016 | 476000 | sigrun@ns.fo |
| Lív Høgnesen | 475017 | 476000 | liv@ns.fo |
| Rannvá Isaksen | 475037 | 476000 | rannva@ns.fo |
| Anna Müller Jacobsen | 475042 | 476000 | anna@ns.fo |
| Súsanna Jacobsen | 475000 | 476000 | susanna@ns.fo |
| Betty Joensen | 475022 | 476000 | betty@ns.fo |
| Bjørg Johannesen | 475039 | 476000 | bjorg@ns.fo |
| Jórun Mathisen | 475035 | 476007 | jorun@ns.fo |
| Ninni Simonsen | 475010 | 476000 | ninni@ns.fo |
| Herfrí Sørensen | 475000 | 476000 | herfri@ns.fo |
| Mása Tróndheim | 475000 | 476000 | masa@ns.fo |
| Beinta Vágsheyg | 475034 | 476007 | beinta@ns.fo |
| **Privatkundadeildin** | | | |
| Marjun E. Joensen, *leiðari* | 475046 | 476001 | marjunj@ns.fo |
| Annubeth Absalonsen | 475047 | 476001 | annubetha@ns.fo |
| Ingun Joensen | 475015 | 476001 | ingun@ns.fo |
| Thorleif Joensen | 475045 | 476001 | thorleif@ns.fo |
| Elmar Poulsen | 475043 | 476001 | elmar@ns.fo |
| Annubeth Sørensen | 475021 | 476001 | annubeths@ns.fo |

| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Vinnudeildin** | | | |
| Eyðun Kjølbro, *leiðari* | 475055 | 476002 | eydunk@ns.fo |
| Guðrið Lava Olsen | 475052 | 476002 | gudrid@ns.fo |
| Julianna Thomsen | 475012 | 476002 | julianna@ns.fo |
| **Fyrisiting (KT-, roknskapar- og starvsfólkadeild)** | | | |
| Marner Mortensen, *leiðari* | 475070 | 476003 | marner@ns.fo |
| Durid Færø | 475068 | 476003 | durid@ns.fo |
| Marianna Hansen | 475069 | 476003 | marianna@ns.fo |
| Eyðun Nolsøe | 475072 | 476003 | eydunn@ns.fo |
| Petra Nysted | 475051 | 476003 | petra@ns.fo |
| **Marknaðardeildin** | | | |
| Gunnar Nolsøe, *leiðari* | 475064 | 476003 | gunnar@ns.fo |
| **Norðdepil** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475090 | 476008 | alvilda@ns.fo |
| **Viðareiði** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475091 | 476009 | alvilda@ns.fo |
| **Leirvík** | | | |
| Kristian Martin Eliasen | 475100 | 476010 | kristianm@ns.fo |
| Mary-Jana á Reynatrøð | 475101 | 476010 | mary-jana@ns.fo |



## LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 31,0 | 31,0 | 32,5 | 30,1 | 29,2 |
| Kjarnukapitalprosent | 31,0 | 31,0 | 32,5 | 30,1 | 29,2 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 11,4 | 11,1 | 12,5 | 12,7 | 9,3 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 10,2 | 9,0 | 10,3 | 10,0 | 7,5 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 2,0 | 1,6 | 1,8 | 1,8 | 1,6 |
| Rentuváði | 5,3 | 2,4 | 2,2 | 2,6 | 1,6 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 1,0 | 0,5 | 0,2 | 0,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 96,0 | 88,5 | 86,5 | 93,9 | 99,5 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 209,1 | 277,8 | 279,9 | 227,7 | 158,6 |
| Stórir kundar tilsamans | 39,1 | 31,6 | 29,6 | 33,5 | 43,1 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,2 | 0,5 | 0,1 | 0,0 | 0,1 |
| Burturleggingarprosent | 4,0 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,2 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | -0,8 | 0,8 | 0,6 | 0,6 | 0,5 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 19,5 | 3,5 | 10,1 | 14,0 | 12,0 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,7 | 3,5 | 3,4 | 3,5 | 3,7 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 40.368 | 46.811 | 51.551 | 55.816 | 57.464 |
| Virðisjavnan | -5.907 | 1.913 | 2.250 | 3.125 | -1.282 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 0 | 0 | 267 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 929 | 888 | 1.236 | 2.841 | 532 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **35.390** | **49.612** | **55.037** | **61.782** | **56.981** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 22.562 | 23.746 | 25.682 | 28.706 | 29.417 |
| Avskrivingar, føst ogn | 748 | 972 | 1.056 | 940 | 1.115 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | -5.970 | 5.562 | 4.159 | 4.967 | 4.654 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **18.050** | **19.332** | **24.140** | **27.169** | **21.795** |
| Skattur | 1.866 | 3.632 | 4.298 | 5.832 | 4.333 |
| **Ársúrslit** | **16.184** | **15.700** | **19.842** | **21.337** | **17.462** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 611.552 | 632.742 | 696.577 | 793.904 | 888.997 |
| Lánsbrøv | 159.615 | 236.596 | 263.529 | 244.126 | 174.049 |
| Innlán | 662.141 | 744.009 | 836.654 | 879.845 | 924.263 |
| Javni | 838.450 | 938.010 | 1.053.574 | 1.114.922 | 1.177.590 |
| Eginpeningur | 167.047 | 182.772 | 202.843 | 224.305 | 242.426 |

## TIL ÁBYRGDARAR OG VIÐSKIFTAFÓLK SPARIKASSANS



*Eyðfinn Reyðberg*
*sparikassastjóri*

### Árið, ið fór

Árið, ið fór, gjørdist eitt gott ár hjá sparikassanum. Úrslitið áðrenn skatt var úti við 22 mió. kr., og hóast hetta eru góðar 5 mió. kr. minni enn undanfarna ár, eru vit væl nøgd við úrslitið.

Havast skal í huga, at umstøðurnar ikki altíð laga seg soleiðis, sum vit vóna og ynskja. Vit kunnu tí fegnast um, at hóast búskaparliga gongdin er versnað í samfelagnum, so hevur hetta bert í lítlan mun ávirkað roknskap sparikassans í fjør. Sparikassin hevur tí í 2003 styrkt um sína støðu sum ein væl konsolideraður, lokalur peningastovnur.

### Broytingartíðir

Eitt samfelag í menning broytist alsamt, og tað gera vit sum fyritøkur og einstaklingar eisini. Nýggjar skipanir og tøknilig menning geva nú viðskiftafólki sparikassans høvi at avgreiða stóran part av sínum dagligu ørindum heimanífrá.

Slíkar broytingar gera, at arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólki sparikassans broytast. Hetta hevur givið okkum betri umstøður til at røkja aðrar uppgávur, sum hava stóran týdning fyri bæði einstaka viðskiftafólkið og sparikassan. Vit fegnast tí um, at deildir okkara nú hava betri stundir til at ráðgeva og vegleiða viðskiftafólki okkara í viðkomandi peningaspurningum.

Sparikassin lagar seg alla tíðina til broyttar umstøður og nýggjar arbeiðshættir, men aðalmálið er, og vil altíð vera, at vit leggja alstóran dent á tað persónliga sambandið, og at tað verður røkt best í nærumhvørvinum.

### Sparikassin 85 ár

Tað eru í ár liðin 85 ár, síðani Norðoya Sparikassi varð settur á stovn. Í hesum sambandi er tað hugaligt at kunna staðfesta, at sparikassin í dag framvegis er ein sunnur peningastovnur, við nøgdum og áhugaðum viðskiftafólki og góðum starvsfólki.

Tað er í hesum sambandi onki yvir at dylja, at sparikassin ynskir at kenna seg heima í lokalsamfelagnum; tí samfelagi, sum hjartað brennir fyri. Somuleiðis er tað okkara aðalmál og hægsta ynski, at øll viðskiftafólk okkara skulu kenna seg

heima í sparikassanum, heilt frá vøggu til ellisár. Hetta er eitt aðalmál hjá okkum øllum, ikki bert sum eitt eiti, men sum hjartað hjá hvørjum einstøkum starvsfólki og ábyrgdarfólki hjá Norðoya Sparikassa brennir fyri.

Sparikassin fer, eins og sparikassin altíð hevur gjørt við rundar stovningardagar, at gera vart við 85-ára stovningardag-in. Enn er ov tíðliga at avdúka hesar ætlanir, men nakað verður gjørt burturúr stovningardegnum seinri í ár.

## Framtíðin

Eftir at vit í Føroyum nú hava upplivað mong góð ár, hava fleiri undanfarna ár merkt niðurgongd í inntøkum, og mong vinnuvirki og fiskiskip hava merkt sviðan av viknandi fiskaprísum. Tað tykist vera soleiðis, at tess betri vit fáa tað, tess meiri fjáltursstungin gerast vit fyri framtíðini, og hvat hon vil føra við sær. Okkara áskoðan er tann, at vit fara sum fiskivinnutjóð altíð liva við upp- og niðurgongd. Tann avgerandi spurningurin er, um vit megna at tillaga okkum broyttu umstøðurnar so hvørt, og at hvør einstakur støðugt roynir at gera sítt til at gera tað lættari og betri at virka og liva í samfelagnum.

Eg vil vegna sparikassan nýta høvið at takka øllum, sum vit á einhvønn hátt samstarva við, fyri gott samstarv í farna ári. Stóra tøkk til hvørt einstakt starvsfólk fyri fyrimyndarligt arbeiði og ágrýtni, dygdir, sum leiðsla og nevnd fegnast stórliga um.

Vit hava gott mót um framtíð sparikassans, og arbeiða støðugt við at menna stovnin, men fremst vilja vit altíð seta teg sum viðskiftafólk, og tørv tín á hollari tænastu og ráðgeving.

Vit eru til reiðar at taka upp nýggjar avbjóðingar.

Ver altíð vælkomin í sparikassan!

Eyðfinn Reyðberg
sparikassastjóri

## 2003 í orðum og myndum

### Deildirnar norðanfyri

1. januar vórðu upplatingartíðirnar á deildunum í Norðdepli og á Viðareiði broyttar/víðkaðar, soleiðis at opið er í Norðdepli týsdag og hósdag frá kl. 11 til 16 og á Viðareiði mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 11 til 16.



*Deildin í Norðdepli er opin týsdag og hósdag frá kl. 11 til 16*



*Deildin á Viðareiði er opin mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 11 til 16*



*Á aðalfundi sparikassans, sum varð hildin á sparikassaloftinum týsdagin 25. februar, vóru Jógvan Joensen og Erling Petersen, ið báðir stóðu fyri vali, afturvaldir. Nevndin skipaði seg við Óla Marnari Christiansen og Finni Kjølbro, sum báðir halda fram sum ávíkavist formaður og næstformaður*



*Erling Petersen*



*Jógvan Joensen*

## Umboðsráðsvalið

Í døgunum 3. til 14. mars høvdu ábyrgdarar sparikassans høvi at gera ávirkan sína galdandi á triðja umboðsráðsvalinum. Vallutøkan var 51,1%. Veljast skuldu 39 umboðsráðslimir: 22 fyri Klaksvíkar Kommunu og útlond, 2 fyri Kalsoy og Kunoy, 6 fyri økið eystan Múla, og 9 fyri Leirvík og Føroyar annars. Tilsamans 93 valevni stillaðu upp: 51 fyri Klaksvíkar Kommunu og útlond, 5 fyri Kalsoy og Kunoy, 13 fyri økið eystan Múlan og 24 fyri Leirvík og Føroyar annars. 26 umboðsráðslimir vóru afturvaldir meðan 13 vóru nývaldir.

Valið endaði við stóra ábyrgdarafundinum í KÍ-Høllini 21. mars, har eini 1.000 fólk høvdu leitað saman. Og skráin var bæði fjølbroytt og spennandi. Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, umrøddi »Sparikassan í dag«, meðan Óli Marnar Christiansen, nevndarformaður, nam við »Endamál sparikassans og framtíðina«. Við heitinum »Møguleikar og vansar við føstum sambandi undir Leirvíksfirði« helt gestarøðarin, Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, ein sera áhugaverdan fyrilestur, har nomið varð við teir møguleikar, sum standa í boði, tá Norðoyatunnilin er vorðin veruleiki, eins og víst varð á fyribils royndirnar frá Vágatunlinum.



*Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri*



*Óli Marnar Christiansen, nevndarformaður*



*Gestarøðarin Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, helt áhugaverdan fyrilestur undir heitinum »Møguleikar og vansar við føstum sambandi undir Leirvíksfirði«*



*Alex Sólstein*



*Í samband við fløguverkætlan fekk Pætur við Keldu handaðan kekk áljóðandi 100.000 kr. frá Tónleikagrunni Norðoya Sparikassa*



*Teir gott og væl 1.000 ábyrgdararnir vóru sera spentir upp á framførsluna hjá Finn Nørbygaard, sum tey flestu kenna frá Finn'sk Fjernsyn, Jydekompagniet og Squashlýsingunum. Og sum væntað hevði Finn eina meistarliga framførslu, har hann bæði sang og undirhelt. Handan klaverið sat Kristian Borregaard sum var saman við Finn á føroyaferðini*



*Kristian Borregaard*



*Finn Nørbygaard og Kristian Borregaard saman við Eyðfinni Reyðberg, Marneri Mortensen og Eyðuni Kjølbro í kantinu sparikassans*



*Stanley Samuelsen, sum taldist millum manningina í Silly Boys, og sum seinru árini hevur virkað sum studiotónleikari í Danmark, sang og spældi nakrar av sínum egnu sangum*



Umframt Finn Nørbygaard undirhelt ein sera vælupplagdur Hilmar Jan Hansen



Kim Hansen



Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, handar nevndini í »Grunnurin Dragin« 250.000 kr. frá sparikassanum



Kvinnukórið Suð undir leiðslu av Steinvør Fonn

## spar2

Hósdagin 20. mars fór nýggja spar2-skipanin av bakkastokki. Við skipanini fært tú eitt nú kanna saldur; tú fært yvirlit yvir bókingar; kanst flyta pening millum kontur; gjalda FI-kort; tilmelda flytingar til V & T og GjaldSkipanina; stovna fastar flytingar; tú kanst fáa yvirlit yvir flytingar, sum verða gjørdar; samskifta við sparikassan umvegis trygt teldupost-kervi; og senda umsókn um lán.

Tú fært samband við spar2 umvegis tína egnu teldu, meðan samband fæst við spar2café uttan mun til, hvar tú ert staddur.

spar2 vendir sær til privatkundar, meðan HeimaGreiðslan í størri mun er ætlað vinnulívinum.

## Hanna Mørkøre

Eini 150 til 200 fólk nýttu høvi at støkka inn á gólvið, tá móttøka var fyri Honnu Mørkøre, sum, eftir 46 ára starvstíð, hevði sín seinasta starvsdag í sparikassanum 31. mars.

Á móttøkuni blásti Klaksvíkar Hornorkestur eitt nú tvey løg hjá pápa Honnu, Sámali Petersen, meðan Eyðfinn Reyðberg vegna stovnin takkaði fyri. Og sum vanligt borgaði Jákup Ziskason fyri einum betri bita.



*Eini 150 til 200 fólk vóru á mót-tøkuni, ið varð hildin fyri Honnu Mørkøre*



*Hanna Mørkøre og Sámal Christiansen*



*Elsa Jacobsen, Eyðfinn Reyðberg og Hanna Mørkøre*



*Vera Mørkøre, ið er verdóttir Honnu, saman við soninum Fróða*



*Jógvan Mørkøre, ið er sonur Honnu, saman við soninum Petur Ova*



*Rakul Ró Steintórsdóttir og Hanna Mørkøre*



*Tónleikabólkurin Gestur vann Prix Føroyar finaluna 2003, ið varð hildin í Norðurlandahúsinum. Prix Føroyar var ein av verkætlanunum, sum varð stuðlað av Tónleikagrunni Norðoya Sparikassa*



*1. apríl varð Tummas Martin Anthoniussen settur í starv í Norðoya Sparikassa. Til 1. august, tá Tummas Martin gjørdist næmingur, starvaðist hann í avgreiðsludeildini*



*15. apríl varð Maria á Lakjuni Simonsen sett í starv í Norðoya Sparikassa, og verður starvsøkið vinnudeildin. Maria er útbúgvin cand. merc. frá handilsháskúlanum í Keypmannahavn*



*Seinrapartin í mai mánað varð handilsbygningurin hjá Skós tikin niður*





*Nýumvælda loftið á høvuðsskrivstovu sparikassans er nú tikið í nýtslu. Á loftinum húsast fyrisiting, grannskoðan, marknaðardeild og kantina*



2. juni tók Lív Høgnesen við starvi sum kassameistari í Norðoya Sparikassa. Lív starvaðist í Føroya Sparikassa frá 1988 til 1990, tá hon tók við starvi í Norðoya Sparikassa



Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, handar nýggja kassameistaranum Lív Høgnesen, blómur og góðynski





Mikudagin 28. mai fáa 16 næmingar handa »Námsprógv í yrkisskeiði innan landbúnað«, sum Klaksvíkar Kvøldskúli, Búnaðardepilin og Mentamálaráðið hava fyriskipað. Næmingarnir, ið vóru nr. 1, 2 og 3, fingu virðisløn. Harumframt lat Norðoya Sparikassi eina eykavirðisløn, ið varð latin tí næmingi, sum vegna verumáta, hjálpsemi, ágrýtni og samstarvsevni sýndi fyrimyndarligasta atburðin. Eftir uppskoti frá floksfeløgunum fekk Jóhanna Maria Hansen úr Hattarvík hesa virðisløn.



1. august gerst Mása Tróndheim, sum hevur starvast í sparikassanum síðani 15. oktober 2002, nýggjur næmingur. Leygarkvøldið 18. mai vann Mása Tróndheim annars innleiðandi umfarið í Ársins Songrødd í Klaksvík og á finaluni eina viku seinri, gerst Mása endaligi vinnari av kappingini. 12 sangarar luttóku í finaluni, ið varð hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

## Nýtt hámark fyri FR- og FR/VISA kort

10. juni varð hámarkið fyri hvussu nógv kann brúkast við FR- og FR/VISA korti fyri hvørjar leypandi 30 dagar hækkað úr 15.000 kr. upp í 20.000 kr. Markið 15.000 kr. hevur verið galdandi síðani 1988.



*Lív Høgnesen og Betty Joensen saman við starvsfólki í Roskilde Bank*



*Lív Høgnesen og Betty Joensen á vitjan í Roskilde Bank saman við Alis Nielsen, ið er ættað úr Fuglafirði, men starvast í Roskilde Bank*



*Lív Høgnesen og Betty Joensen á vitjan í Roskilde Bank*



*Lív Høgnesen og Betty Joensen saman við starvsfólkum í Sparekassen Lolland*



*Lív Høgnesen og Betty Joensen saman við Lynge Thang Jørgensen og Jan Larsen, ið ávikavist eru sparikassastjóri og deildarstjóri í Sparekassen Lolland.*




*Annubeth Absalonsen, Marjun Hansen og Ingun Joensen avmyndaðar í Aberdeen, har tær vóru á málskeiði í enskum*



*Julianna Thomsen, Kristian Martin Eliasen og Guðrið Lava Olsen avmyndaði í Aberdeen, har tey vóru á málskeiði í enskum*

## Útbúgving og skeiðvirksemi

Útbúgving og vitan gevur førleika, og í 2003 hava starvsfólk sparikassans verið á eitt nú málskeiði í enskum, skattaviðurskiftum, virðisbrævagreinan, roknskapi og vinnulívi, umframt skeiðum og kunning í útboði og tænastum sparikassans.




Arne Nielsson



*Arne Nielsson hugsunarsamur*



*Heini Hansen frá Com-Data*



*Eyðfinn Reyðberg og Arne Nielsson*



*Anthonius Olsen og Andras Samson*

## »Viljen til sejr«

Viðrák og sigrar koma ikki av sær sjálvum, hvørki tá hugsað verður um arbeiðið ella heimið. Men hvussu fáa vit kabaluna at ganga upp ella fæst hon yvirhøvur at ganga upp? Við eitt nú fyri eyga at svara hesum spurningum vitjaði danski rógvarin Arne Nielsson Norðoya Sparikassa. Arne hevur vunnið 10 heimsmeistaraheitir, 1 silvurheiðursmerki við Olympisku Leikirnar í Barcelona í 1992 umframt 70 danmarksmeistaraheitir. Á fyrilestrunum, hvørs heiti var »Viljen til sejr«, vísti Arne m.a. á, at fyrsta stigið er innan í okkum sjálvum.

Á vitjanini, ið var í døgunum 18. til 21. juni, hevði Arne Nielsson tríggjar fyrilestrar: Ein fyri ítróttarfólki og frítíðarfeløgum, ein fyri handils- og vinnulívsfólki, og ein fyri starvsfólki og nevnd sparikassans saman við makum. Harumframt vóru tvey serlig starvsfólkaskeið, eins og Arne eisini vitjaði Klaksvíkar Róðrarfelag.



*Arne Nielsson og Guttorm Sørensen*



*Nógv fólk var við á skeiðinum*



*Arne Nielsson og Marjun Kalsø*



*Dagin fyri 84 ára stovningardag sparikassans, týsdagin 23. september, skrivaði sparikassin og KÍ undir nýggjar sponsoravtalur fyri 1. deild kvinnur, allan ungdómshópin, og 1. deild menn. Sáttmálarnir eru galdandi til og við 2006*



*Í 2001 gjørdist sparikassin høvuðssponsorur hjá 1. deild kvinnum í fótbólti og við teirra frálíku úrslitum var ongin ivi um, at sparikassin helt á sum høvuðssponsorur. Sparikassastjórin, KÍ-formaðurin og KÍ-kvinnurnar eftir at sponsoravtalan við kvinnurnar er endurnýggjað*



*Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, og Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, skriva undir nýggju sponsoravtaluna, ið umfatar allan ungdómshópin hjá KÍ. Á myndini eru eisini Una Joensen, Anfinnur Kallsberg, Jákup Ziskasson og Eyðvør Klakstein*







*Fríggjakvøldið 29. august hittist nýggja umboðsráðið til fundar á fyrsta sinni. Umframt kunning og orðaskifti um ymisk sparikassaviðurskifti, helt Finnbogi Joensen, Vestmanna, ein sera áhugaverdan og viðkomandi fyrilestur um umhvørvi og umhvørvisrøkt. Her er Finnbogi avmyndaður í Heygadali í Vestmanna*

## Trivnaður og gott arbeiðsumhvørvi

Trivnaður og gott arbeiðsumhvørvi ganga hond í hond. Hetta hevur sparikassin eisini tikið til eftirtektar, eitt nú við tilboði um kropsviðgerð til starvsfólkið, eins og innbúgv, so sum borð og stólar, eru so ergonomisk sum gjørligt. Hetta sæst aftur á deildini í Leirvík og nýumbygdu loftshæddini á høvuðsskrivstovuni, eins og hetta sum frálíður verður leisturin í øllum sparikassanum.

Eisini endurspeglast hetta í eitt nú talinum av sjúkradøgum, sum eru fækkaðir munandi farnu árini.




*Í desember letur sparikassin úr hondum aðru fløguna við Silvasangum. Talan er um jólafløguna »Jól í Oyravík«, og eins og á fyrru Silvafløguni, sum kom út til jóla í 2001, er tað Kári Jacobsen, sum hevur gjørt tónleikin, meðan Linda MacDonald syngur. Á fløguni eru 12 skeringar, ið umfata nýggjar jólasangir umframt »Eg eri jólamaðurin« hjá Mariusi Johannesen og Hans Jacobi Højgaard, karaokeversiónir og jólaævintýrið »Silvi bjargar jólamanninum«, ið er skrivað av Bettu á Dalinum*

## Jól í sparikassanum

Familjuhugni í breiðastu merking er eitt, sum eyðkennir jólini og tíðina undan jólum. Eins og í fjør varð skipað fyri jólahugna uttanfyri høvuðsskrivstovu sparikassans hósdagarnar í atvent og vóru tiltøkini á nýggja innilokaða Sparikassapallinum á parkeringsøkinum sunnanfyri sparikassan.

Nógv fólk vitjaðu tiltøkini, har eisini varð borðreitt við leskidrykki, kaffi, køkum og karamellum. Á fyrsta tiltakinum, ið var 4. desember, spældi orkestur, ið var mannað við eitt nú Maluni Eyðunsdóttir, og vóru hetta læraraskúlanæmingar undir leiðslu av Herluf Lützen; 11. desember vóru Klaksvíkar Hornorkestur, Brandur Enni, Kristel Lisberg umframt Gospelkórið Gleði, undir leiðslu av Tummasi Paula Mýri, á palli. Seinasta hósdag í atvent, hin 18. desember, spældi ein bólkur við Arnfríð Lützen á odda; Mása Tróndheim, ið er næmingur í sparikassanum og Ársins Songrødd 2003, var eisini á pallinum og sang; Pipar & Salt undirhildu, eins og Linda MacDonald, ið syngur sangirnar á báðum Silvafløgunum, eisini var á palli. Harumframt vitjaðu bæði Silvi og jólamaðurin.



*Malan Eyðunsdóttir Band*



*Rani Nolsøe og Brandur Enni*



*Malan Eyðunsdóttir*



*Malan Eyðunsdóttir Band*





Ungdómskórið »Gleði« í KFUM & K



Kristel Lisberg



Hesar báðar hugnaðu sær



Brandur Enni

## Sparikassin stuðlar

Umframt eitt virkið vinnulív, hevur útboðið av frítíðarvirksemi, umframt tey hugskot, ið hvør sær kann fáast við, alstóran týdning fyri eitthvørt samfelag, tað veri seg lítið, stórt ella lokalt. Sparikassin telist ofta millum stuðlarnar, og millum teirra, ið sparikassin hevur stuðlað farna árið, eru m.a. hesi:

C.I.S.V. Altjóða Barnalegur, Dagtilhaldið í Klaksvík, Føroya Symfoniorkestur, Grunnurin Dragin, Hugni, Innandurakapping í fótbólti fyri sjómenn, ÍSB, Klaksvíkar Ítróttarfelag, Klaksvíkar Fimleikarfelag, Klaksvíkar Hornorkestur, Klaksvíkar Róðrarfelag, Kristiliga Sangkórið, Leirvíkar Kirkja, LÍF, Mjølnir, Orkestrið Ælabogin, Rumeniahjálpin, Seyðasýningin í Klaksvík, Sinnisbati, Sjómanskvinnuringurin í Klaksvík, Svimjifelagið Skeggjar, Svimjifelagið Ægir, Talvkappingin 2nd Klaksvík Kjølbro Heilsøla International, Trivnaðargrunnurin fyri Sjúklingahotellið Tórshavn, Sjálvsognarstovnurin Karvatoftir í Fuglafirði og Útoyggjastevnan á Kalsoynni.

## Ársúrslitið

Norðoya Sparikassi hevði í 2003 eitt úrslit áðrenn skatt upp á 21,8 mió. kr.

Hóast úrslitið er 5,4 mio. kr. lægri enn í 2002, tá tað var metstórt við 27,2 mió. kr., so eru vit vælnøgd við úrslitið, tá búskaparligu umstøðurnar annars vera havdar í huga.

Endaliga ársúrslitið eftir skatt, gjørdist 17,5 mió. kr. ímóti 21,3 mió. kr. í 2002.

## Inntøkur

Hóast útlánsvirksemið er økt, gjørdist netto rentuinntøkan bert 0,7 mió. kr. hægri í 2003 í mun til 2002, tá hon var 53,3 mió. kr. Orsøkin til hetta er serliga, at rentustøðið er lækkað og at sparikassin í 2003 hevur minkað um rentumarginalin.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 57,5 mió. kr. í 2003 ímóti 55,8 mió. kr. í 2002, ein vøkstur uppá 3%.

Sparikassin hevði í 2003 eitt tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra uppá 1,3 mió. kr., móti einum vinningi í 2002 uppá 3,1 mió. kr. Hetta merkir, at nettoávirkanin av virðisjavnan av lánsbrøvum er samanlagt 4,4 mió. kr. tá roknskapurin í 2003 verður samanborin við 2002.

Somuleiðis hevði sparikassin í 2002 serligar inntøkur við sølu av ognum, sum gjørdu at aðrar vanligar inntøkur vóru 2,3 mió. kr. hægri í 2002 enn tær vóru í 2003.

Nettoávirkanin av hesum báðum inntøkupostum er 6,7 mió. kr., sum sæst aftur í úrslitinum í 2003 sæð í mun til 2002.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 29,0 mió. kr. í 2003 móti 28,3 mió. kr. í 2002. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 2%, og stavar frá øktum lønarútreiðslum.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru í 2003 1,1 mió. kr., ið er 0,2 mió. kr. meiri enn í 2002.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá útlán vóru 4,7 mió. kr. í 2003 móti 5,0 mió. kr. í 2002.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er gott. Við árslok 2003 var gjaldførið 258 mió. kr. hóast gjaldførið er minkað við 45 mió. kr., tí sparikassin hevur lænt meira pening út.

Hetta er 90% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans er hetta 26%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans er nú 29,2%. Við árslok 2002 var hann 30,1%. Lógin krevur 8%.

## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru 889 mió. kr. við árslok 2003 og eru tey í árinum vaksin við 12%.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 5% og er nú 924 mió. kr.

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 1.178 mió. kr., og svarar hetta til ein vøkstur uppá 6%.

Eginogn sparikassans er nú 242 mió. kr. Sparikassin hevði í 2003 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 9,3% móti 12,7% í 2002.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at av ársúrslitinum, ið er 17,5 mió. kr. saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum 220,4 mió. kr. og gávugrunninum 1 mió. kr., ella íalt tkr. 238.825, verða lagdar 3 mió. kr. í gávugrunnin, og tkr. 235.825 verða flutt-ar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við árslok 34,1 umroknað til fulla tíð, móti 33,3 fólkum í 2002.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Í mun til seinastu nógvu árini tykist búskaparligi vøksturin vera steðgaður. Tó væntar sparikassin, at úrslitið í 2004 verður um 20 mió. kr áðrenn skatt.



## ÁTEKNINGAR TIL ÁRSROKNSKAPIN

Nevnd og stjórn Norðoya Sparikassa hava í dag viðgjørt og góðtikið ársroknskapin fyri 2003, ið vit viðmæla til aðalfundin at góðkenna.

Klaksvík, hin 3. februar 2004

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| Óli Marnar Christiansen<br>*formaður* | Finn Kjølbro<br>*næstformaður* | Jógvan Joensen |
| Álvur Klakk | Páll Klettskarð | Erling Petersen |
| Kristian Martin Eliasen | Elmar Poulsen | Sigrun Skálagarð |

### Umboðsráðsvaldu grannskoðararnir

Vit hava grannskoðað ársroknskapin 2003 hjá Norðoya Sparikassa, greiddur av leiðsluni.

### Grannskoðanin

Vit hava í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarreglur skipað og framt grannskoðanina við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin er uttan týðandi villur ella vantar týðandi upplýsingar. Undir grannskoðanini hava vit eftir eini meting um týdning og tapsvanda kannað grundarlagið og prógv fyri tær í roknskapinum nevndu upphæddir og aðrar upplýsingar. Vit hava samstundis tikið støðu til tann av leiðsluni valda roknskaparhátt og roknskaparligu metingar, eins og vit hava mett um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Tann framda grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til nakað fyrivarni.

### Niðurstøða

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er í tráð við tey krøv, ið lóggávan setur til roknskaparframløgu, og at roknskapurin gevur eina rætta mynd av sparikassans ogn og skuld, fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

| | |
|---|---|
| København, hin 3. februar 2004 | Tórshavn, hin 3. februar 2004 |
| Martin Gaard<br>*løggildugur grannskoðari* | Símun Absalonsen<br>*skrásettur grannskoðari* |

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 69.911 | 74.049 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 15.870 | 20.737 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **54.041** | **53.312** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 44 | 44 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 3.546 | 2.571 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 167 | 111 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **57.464** | **55.816** |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -1.282 | 3.125 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 532 | 2.841 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.. | 28.985 | 28.335 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.115 | 940 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 432 | 371 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.654 | 4.967 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum | 267 | 0 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **21.795** | **27.169** |
| 23 | Skattur | 4.333 | 5.832 |
| | **Ársúrslit** | **17.462** | **21.337** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| | Ársúrslit | 17.462 | 21.337 |
| | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 220.363 | 199.026 |
| | **Til taks tilsamans** | **238.825** | **221.363** |
| | Lagt í gávugrunn | 3.000 | 1.000 |
| | At flyta til næsta ár | 235.825 | 220.363 |
| | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **238.825** | **221.363** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi | | |
| | uttan uppsøgn í tjóðbankum. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 4.809 | 5.995 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø.. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 79.311 | 52.969 |
| 9 | Útlán . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 888.997 | 793.904 |
| 10 | Lánsbrøv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 174.049 | 244.126 |
| 11 | Partabrøv o.a.. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 724 | 921 |
| 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 15.596 | 4.650 |
| 12 | Ítøkiligar ognir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 10.496 | 8.823 |
| 13 | Aðrar ognir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 3.608 | 3.534 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.177.590** | **1.114.922** |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 0 | 0 |
| 15 | Innlán. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 924.263 | 879.845 |
| | Onnur skuld . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 7.969 | 7.749 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 2.932 | 3.023 |
| | **Skuld tilsamans** | **935.164** | **890.617** |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 3.601 | 2.942 |
| | Gávugrunnur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 3.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 218.363 | 199.026 |
| | Flutt frá ársúrsliti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 17.462 | 21.337 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **242.426** | **224.305** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.177.590** | **1.114.922** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 63.155 | 34.230 |
| | Aðrar ábyrgdir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 8.061 | 1.142 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **71.216** | **35.372** |

## KAPITALFLYTINGAR OG SOLVENSUPPGERÐ

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.942 | 2.817 |
| | Tilgongd í árinum | 705 | 153 |
| | Frágongd í árinum | 46 | 28 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **3.601** | **2.942** |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 3.000 | 1.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | **3.000** | **1.000** |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 220.363 | 199.026 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | -2.000 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 17.462 | 21.337 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **235.825** | **220.363** |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **242.426** | **224.305** |
| | **Solvensuppgerð** | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 242.426 | 224.305 |
| | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 242.426 | 224.305 |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 734.843 | 642.772 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 49.489 | 26.483 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 46.981 | 75.829 |
| | **Vektaði tøl tilsamans** | **831.313** | **745.084** |
| | Solvensprosent sambært BSL §21, stk. 1 | 29,2% | 30,1% |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans. | 29,2% | 30,1% |

## PENINGASTREYMSROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | |
| | Ársúrslit eftir skatt | 17.462 | 21.337 |
| | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| | Útsettur skattur | -32 | 251 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.115 | 940 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.654 | 4.967 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | -59 | -59 |
| | **Íalt frá rakstri** | **23.140** | **27.436** |
| | **Rakstrarkapitalur** | | |
| | Útlán | -99.747 | -102.294 |
| | Innlán | 44.418 | 43.191 |
| | Aðrar ognir | -75 | 2.000 |
| | Onnur skuld | 221 | -3.487 |
| | **Íalt frá rakstrarkapitali** | **-55.183** | **-60.590** |
| | **Íløgur** | | |
| | Lánsbrøv | 70.077 | 19.403 |
| | Partabrøv | 197 | 0 |
| | Kapitalpartar | -10.946 | -4.650 |
| | Ítøkiligar ognir | -2.788 | 635 |
| | **Íalt frá íløgum** | **56.540** | **15.388** |
| | **Fígging** | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 659 | 125 |
| | Broytingar í gjaldføri | 25.156 | -17.641 |
| | Gjaldføri við ársbyrjan | 58.964 | 76.605 |
| | **Gjaldføri við ársenda** | **84.120** | **58.964** |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 1.652 | 2.201 |
| | Útlán | 58.298 | 59.067 |
| | Lánsbrøv | 9.961 | 12.781 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **69.911** | **74.049** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 0 |
| | Innlán | 15.761 | 20.629 |
| | Ábyrgdarpeningur | 109 | 108 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **15.870** | **20.737** |
| 3 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -1.276 | 3.118 |
| | Gjaldoyra | -6 | 7 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-1.282** | **3.125** |
| 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 372 | 460 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 160 | 2.381 |
| | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **532** | **2.841** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| | Løn og samsýning til nevnd | 420 | 360 |
| | Løn og samsýning til stjórn | 981 | 643 |
| | Løn og samsýning til umboðsráð | 72 | 26 |
| | Løn til starvsfólk | 9.703 | 9.117 |
| | Eftirløn | 1.612 | 1.245 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 722 | 745 |
| | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **13.510** | **12.136** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 15.475 | 16.199 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **28.985** | **28.335** |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 34,1 | 33,3 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **585** | **788** |
| | - Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 0 | 75 |
| 6 | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 207 | 176 |
| | Maskinur og innbúgv | 908 | 764 |
| | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **1.115** | **940** |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 432 | 371 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **432** | **371** |
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 79.311 | 52.969 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 0 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **79.311** | **52.969** |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 13.507 | 21.039 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 30.940 | 31.376 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 86.624 | 80.082 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 335.056 | 278.781 |
| | Yvir 5 ár | 422.869 | 382.626 |
| | **Útlán tilsamans** | **888.997** | **793.904** |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 31.914 | 33.517 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **31.914** | **33.517** |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | Akkumuleraðar burturleggingar í % av | | |
| | bruttoútlánum við ársenda (framhald) | 3,2% | 3,9% |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | **1.270** | **78** |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | Børsskrásett | 174.049 | 244.126 |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | Onnur | 724 | 921 |
| | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Onnur | 15.596 | 4.650 |
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 174.049 | 244.126 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn | | |
| | omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | -234 | 2.233 |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 9.536 | 16.102 |
| | Tilgongd | 1.285 | 0 |
| | Frágongd | 0 | 6.566 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **10.821** | **9.536** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 3.284 | 8.095 |
| | Avskrivingar í árinum | 207 | 176 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 4.987 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **3.491** | **3.284** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **7.330** | **6.252** |
| | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Maskinur og innbúgv** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 9.249 | 8.405 |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | Tilgongd (framhald) | 1.503 | 1.094 |
| | Frágongd | 0 | 250 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **10.752** | **9.249** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 6.679 | 6.014 |
| | Avskrivingar í árinum | 908 | 764 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 100 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **7.586** | **6.678** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **3.166** | **2.571** |
| | **Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans** | **10.496** | **8.823** |
| 13 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 3.541 | 3.486 |
| | Aðrar ognir | 67 | 48 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **3.608** | **3.534** |
| 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | **Uttan uppsøgn** | **0** | **0** |
| 15 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 285.979 | 292.360 |
| | Við uppsøgn | 568.619 | 527.573 |
| | Serinnlán | 69.665 | 59.912 |
| | **Innlán tilsamans** | **924.263** | **879.845** |
| | Uttan uppsøgn | 285.979 | 292.360 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 44.662 | 26.312 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 540.295 | 515.947 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 13.572 | 9.470 |
| | Yvir 5 ár | 39.755 | 35.756 |
| | **Innlán tilsamans** | **924.263** | **879.845** |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| | Treytaleys eftirlønartilsøgn | 2.713 | 2.772 |
| | Útsettur skattur | 219 | 251 |
| | **Burturleggingar til útreiðslur tilsamans** | **2.932** | **3.023** |
| 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.942 | 2.817 |
| | Tilgongd, netto | 659 | 125 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **3.601** | **2.942** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 63.155 | 34.230 |
| | Kreditttilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 8.061 | 1.142 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **71.216** | **35.372** |
| 19 | **Stjórn og nevnd** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| | Stjórn | 1.212 | 1.055 |
| | Nevnd | 1.870 | 2.721 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 1.090 | 1.090 |
| | Nevnd | 4.943 | 4.386 |
| 20 | **Kredittváðar – Útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | Almennir myndugleikar | 1 | 1 |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 13 | 7 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 7 | 9 |
| | Byggivinna | 2 | 3 |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 5 | 5 |
| | Flutningur, postur og telefon | 2 | 1 |

| Viðm. | | 2003<br>1.000 DKK | 2002<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna (framhald) | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 4 | 5 |
| | Aðrar vinnur | 2 | 1 |
| | **Vinnur tilsamans** | **35** | **31** |
| | Privat | 64 | 68 |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 1.075 | 4.924 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 702 | 4.376 |
| | Gjaldoyraábending | 373 | 548 |
| | Gjaldoyrábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,2 | 0,2 |
| 22 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| | – alt í DKK | 3.580 | 5.902 |
| 23 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 4.365 | 5.009 |
| | Útsettur skattur | -32 | 823 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **4.333** | **5.832** |
| 24 | **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | |
| | Sp/f Niels Finsensgøta 7 | 50% | 50% |
| | P/f Kósin | 25% | 0% |
| | **Innlán** | **1.198** | **0** |
| | **Útlán** | **40.305** | **145** |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2003 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a., umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2002. Samanberingartølini fyri 2002 og 2003 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum

Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivaði fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av børsskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2003.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tiknir upp til innara roknskaparliga virðið við ársenda 2003.

## Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.

Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í sambandi við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

### Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

### Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

### Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

### Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti eru útreiðsluførdar.



Design og uppseting: Vasti
Prent: Estra

